Jón Tyril um skeinkiloyvi til festivalar:

## Ein bati uppá 500%

Við broytingunum í rúsdrekkalógini, sum tingið samtykti fríggjadagin, fer at bera til hjá teimum sum frammanundan hava skonkiloyvi at søkja um at sleppa at skonkja á eitt nú festivalum. Jón Tyril, sum er samskipari av G! sigur, at hóast hetta ikki er júst tað uppskotið, sum tey høvdu hugsað sær, so er hetta, at onnur kunnu koma inn og skeinkja øl, ein betring uppá 500%.

– Vit síggja tað sum ein spurning, um mann vil hava skipað ella óskipaði viðurskifti, og tað gleðir okkum nógv, at viðurskiftini nú koma í rætt lag, sigur Jón Tyril. Og hann vísir á, at tað kann fáa stóran praktiskan týdning fyri festivalin.

– Fíggjarliga fær tað kanska eisini ein minni týdning, tí hóast tað eru onnur sum standa fyri ølsøluni, og harvið fáa inntøkurnar, so gangi eg út frá, at tey, sum vilja selja øl á festivalinum, er sinnaði at rinda fyri tað, akkurát sum øll onnur gera, sum selja eitthvørt á G!, staðfestir Jón Tyril.

**RWD**

# Øl til festivalarnar

**Nú fer at bera til at skonkja øl til tiltøk, har nógv fólk eru komin saman. Hetta avgjørdi løgtingið á seinasta fundinum fríggjadagin.**



RÚSDREKKAMÁLIÐ

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nógv hevur staðið á í tinginum seinastu dagarnar, og fleiri átrokandi og týðandi uppskot skuldu fáast av vegnum, nú tingið fer í summarfrí. Eitt hitt seinasta bragdi hesa tingsetuna gjørdist, at uppskotið um at broyta rúsdrekkalógina, so eitt nú festivalar, ráðstevnur og onnur stór almenn tiltøk skulu kunna søkja um at skeinkja øl bleiv samtykt. Við ynk og fred vildi onkur kanska tikið til.

Tað var Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, sum vegna landsstýrið legði uppskotið um broyta rúsdrekkalógina fram í vár í ár. Í grundgevingunum til uppskotið, varð sagt, at eftir galdandi rúsdrekkalóg er bert loyvt at skeinkja rúsdrekka á støðum við skeinkiloyvi, og loyvi til útskeinking kann einans verða veitt persónum, feløgum o.l., ið reka hotell- og restaurationsvirksemi. Heimild er ikki fyri at loyva, at skonkt verður til støk tiltøk, eins og vanligt er aðrastaðni. Tískil er ikki møguligt at veita loyvi til at skeinkja á eitt nú stevnum og øðrum tiltøkum, eins og møguleiki ikki er fyri at skeinkja rúsdrekka í sambandi við, at størri almennar veitslur ella dansikvøld, um hesi tiltøk verða hildin á øðrum støðum enn teimum, sum hava permanent skeinkiloyvi.

### Drekka niðurfyri

Víðari verður sagt, at verandi rættarstøða neyvan virkar tálmandi upp á nýtsluna, men hinvegin elvir til, at drukkið verður undir óskipaðum viðurskiftum uttan eftirlit. Av tí, at rúsdrekka ikki kann keypast til hesi tiltøk, verður mangan drukkið ríkiligt niður fyri, áðrenn farið verður heimanífrá, umframt at fólk hava rúsdrekka við sær. Henda støða er óvirðilig, og minnir rúsdrekkamentanin á hesum øki ikki so lítið um ta rúsdrekkamentan, vit kendu so væl í Føroyum fyrr, og sum roynt var at koma burturfrá við nýggju rúsdrekkalógini í 1992.

Núverandi skipan hevur eisini óhepnar avleiðingar við sær fyri trygdina til tey størru av umrøddu tiltøkum – her verður serliga hugsað um festivalarnar og størri dansikvøld, av tí at stórur vandi kann standast av teimum fløskum, sum fólk ofta hava við sær. Hóast tað ikki er loyvt, eru royndirnar hjá teimum, sum skipa fyri slíkum tiltøkum og standa fyri vaktarhaldinum, at tað ikki ber til at sleppa undan, at fólk hava fløskur við sær inn á økið við teimum óhepnu avleiðingum, hetta hevur við sær. Mett verður, at hesin trupulleiki hevði verið munandi minni, um loyvt var at skeinkja á staðnum. Hetta hevði samstundis gjørt tað møguligt at styrkt eftirlitið við teimum yngru, sum ikki hava aldur at keypa rúsdrekka á staðnum.

Uppskotið um rúsdrekkalógina varð samtykt við atkvøðunum 19 fyri og 12 ímóti, og fer tað at virka um nakrar vikur.

STARV Í BÓNUS
Í TÓRSHAVN

**Frukt og grønt**

Søkt verður eftir einum fólki til at taka sær av frukt & grønt og kølivørum at byrja skjótast gjørligt.

**Vit vænta at tú:**
- Kanst taka ábyrgd.
- Kan taka tær av at steingja handilin um handilsleiðarin ikki er til staðar.
- Ert fyrikomandi, røsk/raskur, og er ikki bangin fyri at taka fat.
- Fyrr hevur verið í handli, men tað er tó ikki eitt krav.
- Ert álítandi og møtir til tíðina.

Løn eftir S & K.

**Um hettar er nakað fyri teg, send so eina umsókn til:**
Bónus Tórshavn
Postboks 1059
110 Tórshavn
Att: Simon Høffner

Merk brævbjálvan ( Varaleiðari )

Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mai.

BÓNUS – er biligari!

STARV Í BÓNUS
Í TÓRSHAVN

**Varaleiðari**

Søkt verður eftir einum varaleiðara til Bónus í tórshavn , at byrja skjótast gjørligt.

**Vit vænta at tú :**
- Kanst taka ábyrgd tá handilsleiðarin ikki er til staðar.
- Kanst ganga fremst, sum ein góð fyrimynd fyri hini starvsfólkini.
- Ert fyrikomandi, røsk/raskur, og er ikki bangin fyri at taka fat.
- Fyrr hevur verið í handli, men tað er tó ikki eitt krav.

Løn eftir avtalu og førleika.

**Um hettar er nakað fyri teg, send so eina umsókn til:**
Bónus Tórshavn
Postboks 1059
110 Tórshavn
Att: Simon Høffner

Merk brævbjálvan ( Varaleiðari )

Umsóknin má vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mai.

BÓNUS – er biligari!